**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Stuðulsskipanin fyri vaksin*

# Endurlýsing Sosialráðgevi

## til stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum sosialráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst.

Stuðulsskipanin fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.

**Talan er um avloysarastarv í tíðarskeiðnum: 1. juni – 31. desember 2006.**

**Starvsuppgávur:**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum og stovnum
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamur og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøki fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðusskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Odu Jóhansdóttir, virkandi leiðara ella við Sofíu Jespersen virkandi varaleiðara.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreist: 24. apríl 2006.**

# Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðli til barnagarðin í Leirvík, at byrja 1. mai 2006.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðin hjá stuðlinum verður at stimbra einum barni motoriskt og annars vera um barnið í gerandisdegnum.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Gunnvu Thomsen á tlf. 743125.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2006.

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# El-Teknik søkir eftir fólki

Søkt verður eftir fólki at byrja skjótast gjørligt.

**Krøv:**
Elektrikkari ella tilsvarandi útbúgving.
Ert fyrikomandi og ágrýtin
Góð samstarvsevnir

**Vit arbeiða við:**
Virkisinstallatiónum
PLC-stýringum
Yvirvakin við PLC og SCADA

**El-Teknik kann bjóða tær**
Stóra avbjóðing í arbeiðinum
Fjølbroytt arbeiði
Samstarv við nógvar ymiskar kundar

Hevur hetta tín áhuga, ring so til Jákup Tróndheim 594419.

**El-Teknik Sp/f**
Tlf. +298 44 33 13 · Fax nr. +298 44 33 14
E-mail: elteknik@elteknik.fo
FO-520 Leirvík
Føroyar

*Málningaframsýning á páskum*

Lions Club Eysturoy skipar fyri árligu málningaframsýningini

1. og 2. páskadag í Runavíkar skúla

Opið verður báðar dagarnar frá kl. 15 til 20.

Kostnaður kr. 40,-. Innkomni peningurin fer til góðgerandi endamál.

Atgongumerkið (myndaskráin) er samstundis lutaseðil uppá ein málning.

Lutaseðlar uppá aðrar málningar verða seldir báðar dagarnar.

Framsýningi verður sett 1. páskadag kl. 15 av Fríðgerð Heinesen, borgarstjóra í Leirvík. Limir úr Norðljómi spæla eisini nøkur stykkir.

**Lions club Eysturoy**



# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruplláss leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotellvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla í Danmark.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
c/o Vørður
Hoyvíksvegur 65
Tel 23 62 11 ella 31 21 61

# Línumaður søkist

til norskan bát skjótast gjørligt.

**P/F Jógvan Weihe**
Tlf. 553897